## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# OG LØGMAÐUR TRYGGJAR EIK

– Eik Banki fer ongan veg. Eik Banki verður verandi partur av føroyska bankageiranum bæði fyri og eftir 10. desember.

Tað var greiði boðskapurin hjá løgmanni í útvarpinum leygarkvøldið.

Men útmeldingarnar hava verið løgnar. Andstøðan vil ikki vera við í eini almennari bankabjarging, og leygardagin boðaði Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins á landsfundi frá, at landið ikki skal keypa Eik.

Tað er ikki so løgið, at óstortliga framferðin hjá formanninum í Finansiel Stabilitet hósdagin fær fólk at hugsa um seinastu bankabjarging, sum skapti so ring viðurskifti millum Føroyar og Danmark. Hvønn hann vildi ræða, er ikki gott at vita. Um hetta var ein boðskapur til landsstýrið, so kundi tann boðskapurin verið givin á annan og fólkaligari hátt.

Men tað skert ikki burt, at tann støðan, sum hann greiddi frá verður, um eingin keypari finst, hana mugu vit ikki koma í.

Hugsið bara um sethúsamarknaðin, um túsundtals sethúsaeigarar koma í ta støðu, at lán mugu sigast upp og fígging søkjast í øðrum peningastovni. Tá fer allur sethúsamarknaðurin í knús.

Og tann, sum í hesum døgum rekur vinnu, veit og skilir, hvussu stóran týdning gjaldføri hevur, og hvussu týdningarmikið tað er at hava ein peningastovn, sum kann veita tær kreditt. Tað er munurin millum lív og deyð hjá nógvum vinnuvirkjum, og nógv arbeiðspláss verða hótt, og nógvir húsagangir kunnu verða úrslitið.

Tí er tað ábyrgdarloysi, um einki verður gjørt til tess at bjarga bankanum.

Men hesa støðuna koma vit ikki í. Tað hevur løgmaður garanterað. Hann sigur, at vit skulu sláa kalt vatn í blóðið, tí tað er ikki ein møguleiki, at Eik Banki hvørvur úr føroyska fíggjargeiranum. Hann heldur, at seljarin helst hevur onkra orsøk til at hava so stóran skund, sum formaðurin í Finansiel Stabilitet vísti á hósdagin. Men løgmaður vísti eisini, at tað ikki



verður hesin nevndarformaður, sum fær síðsta orðið. Kemur tað hartil, so verður tað ein spurningur millum donsku stjórnina og landsstýrið.

Øll eru helst samd um, at tað besta er, at tað ikki verður neyðugt hjá landinum at keypa bankan. Men sjálvandi má landsstýrið fyrireika seg - og um neyðugt traðka til.

Konspiratiónsteoriirnar nytta lítið, tá bankin er avviklaður...

Hetta er so prísurin, vit mugu gjalda fyri eksperimentið hjá nøkrum fáum, sum skuldu spæla íslendingar. Ein dýrttjentur lærupengi, sum ikki eigur at endurtakast.

**»» Sambært løgmanni er eingin vandi fyri Eik**

# 10 ár síðani danska leigusveinin



*Tað var tann 22. november í 2000, at Tórbjørn Jacobsen kalla Anfinn Kallsberg ein danskan leigusvein*

At summir politikarar eru litfagrari, enn aðrir, er so mangan sjón fyri søgn. Ein teirra, sum onkuntíð hevur verið í so litfagur, er tjóðveldispolitikarin, sum nú hevur boðað frá, at hann gevst í politikki til komandi val, Tórbjørn Jacobsen.

Fyri júst 10 tíggju árum síðani borðreiddi Sosialurin við Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharra, á forsíðini, har hann skírdi Anfinn Kallsberg, løgmann at vera ein *danskan leigusvein*.

Illsinnislepsið hjá Tórbjørn Jacobsen kom, eftir at løgmaður hevði biðið hann tikið aftur rundskriv, har hann hevði givið skúlunum frí 1. mai í staðin fyri grundlógardagin.

Men tað var eftirspælið av orrustuni, sum vit á redaktiónini minnast best. Tá vit bóðu løgmann um viðmerking, fór alt maskinaríið í gongd. Tórbjørn Jacobsen varð sendur út á redaktiónina hjá okkum á Argjum, har hann læs greinina - og váttaði, at hann hevði sagt alt tað, hann varð endurgivin fyri at siga.

Men tað hóvaði ikki leiðsluni í flokki hansara. Høgni Hoydal ringdi fleiri ferðir til fleiri okkara og júkaði okkum um at steðga útgávuni av blaðnum. Men tað bar ikki til – og blaðið var farið til prentingar. Endin var so tann, at eitt tíðindaskriv kom frá Tórbjørn Jacobsen – sent umvegis telefaxið hjá Høgna Hoydal, har hann avsannaði alt, hann varð endurgivin fyri at siga. Alt var íspinn hjá Sosialinum, segði hann:

*»Undirritaði hevur ongantíð brúkt hetta orðið um løgmann og kundi eiheldur nakrantíð funnið upp á tað. Harumframt eru í greinini ein røð av øðrum viðurskiftum og ákærum mótvegis løgmanni, sum eg eri siteraður fyri. Undirritaði vil hervið treytaleyst avsanna øll úttalilsir í greinini, sum snúgva seg um løgmann.«*

Tíbetur hevði blaðmaðurin bandað samrøðuna. Sjónvarpið spurdi kvøldið eftir Tórbjørn, um tað veruliga var ein lygisøga, sum Sosialinum borðreiddi við. Tað váttaði mentamálaráðharrin. Síðani spældi sjónvarpið bandupptøkuna – og Tórbjørn stóð sum hevði hann bitið í lort – avdúkaður fyri at lúgva alment fyri opnum skíggja.

Seinni hevur Tórbjørn Jacobsen sagt, at tíðindaskrivið, hann sendi, varð skrivað upp á nakkan á honum fyri at bjarga samgonguni.



**»» Ein spurningur um virðing**

SÚSANNA O. SKAALE
KJAK Á SÍÐU 34



**»» Set hælarnar í Eidesgaard**

NAPOLION MAGNUSSN
KJAK Á SÍÐU 34

# Fáa meira at vita um fosturbørn



*Savnsmynd*

Mikudagin 25. nov. eru 10 ár liðin síðani Fosturforeldrafelagið varð stovnað.

Í tí sambandi skipar felagið fyri evnisdegi, har Tórun Højgaard Ósa, samfelagsfrøðingur, heldur fyrilestur um eina kanning, sum hon hevur gjørt av føroyskum fosturbørnum.

Eisini fer sálarfrøðingurin, Rigmor Napolionsdóttir, at hava fyrilestur um empatiskt samskifti.

Felagið varð stovnað av nøkrum fosturforeldrum, sum høvdu havt fosturbørn í nøkur ár. Hesi fosturforeldrini samlaðust í bólkum, sum Sosiala deild í Tórshavnar kommunu skipaði fyri. Fosturforeldrini hildu, at tað var av stórum týdningi, at at tey skipaðu seg í felag at fáa skeið og skipa fyri øðrum tiltøkum fyri at menna førleikararnar at taka sær av børnum, ið høvdu verið fyri vansorgan.

Síðani hava fleiri skeið og onnur tiltøk verið.

Eitt mál, sum Fosturforeldrafelagið hevur, er eisini at menna fosturbørnini. Í tí sambandinum hevur felagið tey seinastu árini skipað fyri Fosturfamilju-døgum. Hesi tiltøk hava eydnast sera væl. Næsta ár ætla tey at hava ein Fosturfamiljudag í Nesvík, har fosturbørnini fáa høvi til at vísa í verki, gjøgnum tónleik, dans, sang, list og annað, sum tey duga.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*